**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstroling- djúpt. Túrur nr. 1538**
**Tíðarskeið: 17-27/09-2015**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Mourits Mohr Joensen, Marit Pedersen, Poul Vestergaard, Petur Steingrund og Lise Helen Ofstad.

**Ábyrgd:** Lise Helen Ofstad (kanningarleiðari og toktleiðari).

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at kanna botnfisk á djúpum leiðum. Áherðsla varð løgd á at kanna m.a. brosmu, blálongu, gulllaks, stinglaks, langasporl, trantkongafisk og svartkalva. Hitin við botn varð skrásettur.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 40 mm meskavídd í posanum, rockhopper grunnur, 120 m breitlar og Vágs-lemmar. Miniloggarar.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini klokka 21.15 hóskvøldið 17/9. Byrjaðu við at taka støðirnar eystur og suður av Munkagrunninum. Síðani á Wyville Thomsonrygginum, á Føroyabanka, Bill Bailybanka (Ytrabanka), Lúsabanka (Ytstabanka), og vestur og norður av Landgrunninum (Mynd 1). Veðrið var sera gott allan túrin, so vit kláraðu fleiri støðir enn mett og komu inn nakað fyrr enn ætlað.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og Sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Búningarstigini til botnfisk (bústig 1-7, talva 4.4.1 í Sýnishondbókini) vóru brúkt fyri øll fiskasløg undantikið gulllaks (bústig 1-7, egin), kongafisk (bústig 1-4, talva 4.4.3), langasporl (bústig 1-4, talva 4.4.5), havtasku (bústig 1-5, eigin) og stinglaks (bústig 1-5, Gordon et al. 2000).

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Miða ímoti at alt er klárt í seinasta lagi 1. desember 2015.

**Fyribilsúrslit:** 83 støðir vórðu tiknar og harav vórðu 78 góðkendar. 89 ymisk sløg vórðu skrásett. Eins og í fjør varð gýtandi gulllaksur fingin vestan fyri Mykines á umleið 600 m dýpi. Eisini vóru hál á túrinum við gýtandi hávi. Tvey nýggj fiskasløg vórðu skrásett fyri fyrstu ferð undir Føroyum. "Troldfisk" (*Anaplogaster cornuta*) (Mynd 2) og ein, har slagið ikki er endaliga staðfest enn (Mynd 3).




**Mynd 1.** Yvirlit yvir støðir á túri 1538.

**Talva 1.** Veiða, nytrur, magar og tal av støðum tikin á túri 1538 – yvirlitstroling djúpt.

| Fiskaslag | Kg í alt | Nytrur | Magar | Tal av støðum |
|---|---|---|---|---|
| SVARTKJAFTUR | 9428.011 | 3 | 3 | 59 |
| KIKARAFISKUR | 7760.056 | 42 | 11 | 17 |
| HAVMUS | 4209.945 | | | 41 |
| TRANT KONGAFISKUR | 3719.893 | 179 | 51 | 43 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 2371.005 | 79 | 18 | 30 |
| GULLAKSUR | 2359.942 | 232 | 72 | 55 |
| STINGLAKSUR | 2311.123 | 78 | 9 | 18 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 1997.504 | 5 | | 31 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 1923.468 | 10 | 3 | 34 |
| SVARTKALVI | 1220.608 | 119 | 41 | 16 |
| BLÁLONGA | 1209.760 | 258 | 76 | 50 |
| TINDASKØTA | 715.855 | | | 23 |
| HAVTASKA | 321.340 | 30 | 11 | 14 |
| KUBBUTA LANGASPORL | 289.319 | 40 | 11 | 11 |
| SKRUBBHÁVUR | 285.464 | | | 12 |
| GLIGGJHÁVUR | 275.348 | | | 7 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 251.635 | | | 33 |
| BROSMA | 220.378 | 89 | 16 | 40 |
| BLÁGOMUR | 200.284 | | | 6 |
| SKRAMBUL | 182.391 | | | 47 |
| UPSI | 181.287 | 13 | 3 | 11 |
| MORA | 164.840 | 21 | | 16 |
| SVARTHÁVUR | 158.872 | | | 4 |
| BUKSVARTI HÁVUR | 158.253 | | | 18 |
| NEVHÁVUR | 157.355 | | | 12 |
| HALAHVASSA SKØTA | 150.297 | | | 8 |
| LÍTLA BROSMA | 147.009 | 27 | | 22 |
| LONGA | 134.300 | 31 | 3 | 9 |
| LANGITRANTUR | 76.526 | | | 10 |
| SLÆTTHØVD | 74.070 | 6 | 3 | 9 |
| SVARTBLETTUTA LANGASPORL | 69.681 | | | 22 |
| BLÁRIDDARI | 58.384 | | | 24 |
| ISHAVSSKØTA | 48.315 | | | 2 |
| COLLETTS BUKSVARTI HÁVUR | 47.028 | | | 5 |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 46.771 | | | 9 |
| LÝSINGUR | 40.093 | 12 | | 5 |
| ULVFISKUR | 35.879 | | | 13 |
| LALLA | 35.693 | | | 11 |
| TINDABAK | 30.583 | 1 | | 6 |
| TOSKUR | 25.525 | 5 | 5 | 2 |
| REYDKRABBI | 20.741 | | | 7 |
| SILVUR MURTUR | 19.181 | | | 7 |
| SKØTA(BATIS) | 18.100 | | | 1 |
| RISNA LANGASPORL | 18.030 | 5 | 3 | 2 |
| SVARTFISKUR | 16.950 | 1 | | 5 |
| HVALSPYGGJ | 14.917 | | | 3 |
| KLÆNASPORL | 14.674 | | | 10 |
| SANDSKØTA | 14.435 | | | 3 |
| HVASSASPREK | 10.649 | | | 3 |
| MJAI PRIKKAFISKUR | 8.230 | | | 19 |
| STORA LAKSATOBIS | 7.874 | | | 2 |
| RONDSVARTI HÁVUR | 5.523 | | | 2 |
| FAGURSERKUR | 5.465 | 5 | 1 | 2 |
| SMÁSKRUBBUTI GLÁMUR | 4.929 | | | 2 |
| ANNAD(YMISKT) | 4.775 | | | 1 |
| ROGNKELSI | 3.500 | | | 1 |
| OCTOPUS | 3.470 | | | 2 |
| LIRI | 3.460 | 1 | 1 | 1 |
| HÝSA | 3.287 | | | 1 |
| LÍTLIGLÁMUR | 2.796 | | | 14 |
| HVITASKØTA | 2.540 | | | 1 |
| GLASKVOYSA | 2.445 | | | 1 |
| RÆKJA | 2.382 | | | 14 |
| SILD | 2.162 | | | 2 |
| BOA-DREKAFISKUR | 1.246 | | | 3 |
| HVITINGSBROÐIR | 0.870 | | | 1 |
| SLÆTTA LANGASPORL | 0.765 | | | 6 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| SLOAN'S ORMFISKUR | 0.693 | | | 7 |
| TRØLLAKRABBI | 0.690 | | | 2 |
| LEYSIKJAFTUR | 0.613 | | | 1 |
| LJÓSANGI | 0.568 | | | 3 |
| KROKODILLUPRIKKAFISKUR | 0.502 | | | 3 |
| LITLA LAKSATOBIS | 0.478 | | | 5 |
| KLINGRUSKOETA | 0.381 | | | 1 |
| MAKRELUR | 0.375 | | | 1 |
| KALDI ULVFISKUR | 0.329 | | | 1 |
| SÆVARANGI | 0.313 | | | 2 |
| SNIPUALLUR | 0.287 | | | 5 |
| ÓKENT | 0.209 | | | 1 |
| HEKSAKRABBI | 0.082 | | | 1 |
| "TROLDFISK" | 0.078 | | | 1 |
| MJAANGI | 0.058 | | | 1 |
| SEILUR | 0.055 | | | 1 |
| TRANT LANGASPORL | 0.035 | | | 1 |
| MJAIKJAFTUR | 0.021 | | | 1 |
| TUSSAFISKUR | 0.019 | | | 1 |
| LÍTLI PRIKKAFISKUR | 0.016 | | | 3 |
| GESTFISKUR | 0.006 | | | 3 |
| TILSAMANS | 43313.294 | 1292 | 341 | 966 |



Mynd 2. "Troldfisk" (*Anaplogaster cornuta*) fingin norðan fyri Føroyabanka á umleið 800 m dýpi.



Mynd 3. Ókendur fiskur. Fingin sunnast á Wyville-Thomsonrygginum á umleið 600 m dýpi.

**Viðmerkingar:** 55 genetikkprøvar av blálongu frá 5 ymiskum økjum vórðu tiknir. Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í imp-útskriftirnar.

Lise H. Ofstad